# Nýtt bátafelag í Sørvági

**Sørvágs Bátafelag varð stovnað á fundi í Sørvági týskvøldið. Umleið 25 limir eru longu í felagnum**

SIGLING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Tvær stórar áir renna út í bátahylin í Sørvági. Tað ger, at hann grynnist skjótt, umframt at ísur legst á hann, tá kalt er í veðrinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Sørvingar hava fingið egið bátafelag. Felagið fer at skipa fyri ymsum tiltøkum fyri tey, sum hava hug at flóta, eins og tað skal vera bindilið millum báteeigarar og kommunalu myndugleikarnar.

Stórur áhugi er fyri slíkum felag, sigur formaðurin, Regin Jespoersen. Á stovnandi fundinum, sum var hildin týskvøldið, vóru 21 mans og ein kvinna. Limatalið er umleið 25 í dag, og tey vænta, at tað saktans kann gerast tað dupulta, sigur hann.

Felagið fer at taka sær av áhgamálunum hjá teimum, sum eiga bátar í Sørvági. Eitt nú samskiftinum við kommununa, sigur formaðurin.

Hann sigur, at umtøðurnar í bátahylinum eru rímiliga góðar, men kundu væl verið betri, tí har er ov grunt.

Tvær stórar áir renna út í bátahylin í Sørvági,og tær bera so mikið við sær, at tað merkist, sigur formaðurin í Sørvágs Bátafelag. Tað fyrsta verður tí at fáa ávirkað kommununa til at fara undir dýping í hylinum, sigur hann.

Í aðrar mátar verður tað at skipa fyri tiltøkum av ymsum slagi, sum slík feløg plaga at standa fyri. So sum felagstúrum og stevnum. Tó væntar formaðurin ikki, at nøkur slík stevna verður í ár.

Sørvágs Bátafelag hevur fingið innivist í kappróðrarneystinum í Sørvági. Felagið fer at halda til í miðhæddini í neystinum, sum liggur við bátahylin. Okkurt smávegis verður at innrætta og so skulu eisini wc gerast, sigur formaðurin. Tá verða hølisviðurskiftini so eisini av teimum bestu væntar hann. Køkur er frammanundan í hølunum.

Nevndin,sum vald varð á fyrsta fundinum er mannað við: Regini Jespersen, Johan Magnussen og Kára Petersen. Eykalimur er Kim Hansen.

## Seinasta umfar í liðkappingini

TÍÐINDASKRIV:

Leygardagin 14. febr. endar liðkappingin í talvi. Sum vanligt verða allir dystirnir í seinasta umfari telvaðir undir somu lon, og í ár verður byrjað kl. 13 í Bygdarhúsinum í Hósvík.

Stórur spenningur er um hvør verður Føroyameistari. Klaksvíkar Talvfelag hevur 25 stig (15 dystarstig), Kollafjørðar Talvfelag 23 stig (13 dystarstig) og Havnar Telvingarfelag hevur 21 stig. Klaksvík og Havnin møtast í síðsta umfari, meðan Kollafjørður telvar móti toftamonnum. Reglurnar siga, at um tað stendur á jøvnum í stigum millum oddaliðini, verður hugt eftir dystarstigunum. Stendur eisini á jøvnum har, verður umdystur.

Sandavágur flytur niður í 2. deild, eftir at hava verið eitt ár í bestu deildini.

Í hinum deildunum kunnu oddaliðini vissa sær fyrsta pláss, um teir bert møta til seinasta dystin, og harvið sleppa undan minus-stigum.

Klárt oddaliðið 2. deild er Vestmanna Talvfelag, HT3 er greitt á odda í 3. deild, og Klaksvíkar Talvfelag (a) vissar sær Føroyameistaraheitið í unglingadeildini við at møta til seinasta dystin.



## Mozart og Brahms í Kommunuskúlahøllini

Sunnukvøldið komandi (15. februar) býður Havnarkórið til konsert í Kommunuskúlahøllini í Havn. Á skránni eru kórsangir eftir W. A. Mozart (1756 - 1791) og Johannes Brahms (1833 - 1897).

Lagt verður fyri við Brahms, einari røð av hansara vælljómandi a cappella satsum fyri blandað kór - tann eini tó duett (Sanna í Brekkunum og Randi Hansen) og kvinnukór við klaverfylgispæli. Hesin parturin endar við Brahmssa yndisligu kórvøgguvísu Wiegenlied.

Mozart-skráin byrjar við, at Petra Iversen syngur kendu ariuna Voi che sapete úr operuni "Die Zauberflöte" (Gandafloytan). Síðan fylgir motettin Laudate Dominum fyri sopransolo (Berghild Poulsen) og kvinnukór við klaverfylgispæli, og eftir enn tveir satsir úr Gandafloytuni endar kórið sín a cappella part, t.e. kór uttan fylgispæl, við kanon fyri trý blandað kór.



Klarinettspælarnir Sára Zachariasardóttir, Ása D. Apol og Sonja D. Nolsøe, næmingar hjá Peder Riis-Jensen, koma síðan fram á pall og framføra saman við kórinum tríggjar av Mozartsa 6 Kansonettum fyri kórtrio og blásarar.

Konsertin endar við fýra "Zigeunerlieder" eftir Johs. Brahms fyri blandað kór klaver.

Tað er Jóhannes Andreasen, sum hevur alt klaverfylgispælið á konsetini um hendur.

Konsertin byrjar kl. 20.00 og kostar 80 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn í skúlaaldri.





*Norski línubáturin, Skarhaug, sum var í Saltangará eftir agni fyrst í vikuni. Vitjanin førdi til, at fyrrverandi skipsfelagar hittust aftur eftir ikki at hava sæð hvønn annan í tríati ár*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sjómenn hittust aftur eftir 30 árum

**Tá ið norski línubáturin, Skarhaug, var í Saltangará eftir agni fyrst í vikuni, hitti truck-førarin hjá Skipafelag Føroya, Kristian Martin Hammer (Kissi), fyri fyrstu ferð í tríati ár tveir av sínum skipsfeløgum aftur**

SJÓMANSSØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mang kann tykjast undarligt og tilvildarligt í hesum heimi. Og tó; kanska er sumt ikki so tilvildarligt kortini.

Nógvar eru kendu sjómanssøgurnar, og nógvar eru tær, ið almenningurin ongantíð kemur at kenna. Soleiðis er tað nú einaferð.

Sosialurin datt á eina av hesum søgum mánadagin, men tíverri eydnaðist okkum ikki at taka myndina, sum hevði verið prikkurin yvir i'ið, um hon var við.

Søgan byrjar, tá ið norski línubáturin, Skarhaug, kemur á Saltangará eftir agni seinasta sunnudag.

Mánamorgunin, tá ið Sosialurin var fram við á bryggjuni við myndatólinum, lá línubáturin framvegis, men tá vistu vit einki um, at nøkur serlig søga var at "heinta" í hesum sambandi.

Seinni fingu vit so eitt "tips" um, at her kortini var ein sjómanssøga at heinta.

Men tá var norski línubáturin farin avstað aftur…

### Tríati ár seinni

Sunnukvøldið vitjaði Jákup Hansen, sum eigur línuskipið, Mascot, umborð á Skarhaug. Undir vitjanini spurdi ein av manningini Jákup, um hann kendi Kristian Martin Hammer, vanliga nevndur Kissi.

Jú, Jákup kendi Kristian Martin. Hann er truckførari hjá Skipafelag Føroya, og hansara dagliga starv er her á bryggjuni!

Klokkan 21 sama kvøld ringdi telefonin heima hjá Kristian Martini. Tað var Jákup, sum greiddi frá, at umborð á Skarhaug vóru tveir mans, sum kendu hann og fegin vildu hitta hann.

Teir høvdu verið saman í Ný Foundlandi fyri 30 árum síðan og høvdu ongantíð sæst síðan.

- Eg fór oman á bryggjuna beinanvegin, og har hitti eg teir báðar. Tá ið vit komu í prát, kendi eg teir aftur, men eg mintist ikki nøvnini. Tað var sera hugnaligt at hitta menninar aftur nú tríati ár seinni.

Kristian Martin sigur, at norðmenninir vóru umleið 19 ára gamlir, tá ið hann var saman við teimum umborð á norska línubátinum, Koralhav í 1974-1975.

- Eg minnist, at hetta vóru allir fryntligir menn. Aðrir føroyingar vóru eisini umborð á Koralhav, men eingin hiðani á leiðini. Hinir vóru úr Leirvík og Kollafirði.

Kristian Martin sigur, at hann sigldi eini sjey ár við reiðarínum, sum átti Koralhav.

### Heim við

- Umborð á Skarhaug tosaði eg mest við annan av hesum monnum, og hesin kom heim við mær hetta kvøldið. Vit prátaðu væl og leingi, og klokkan var farin av midnátt, áðrenn norðmaðurin fór umborð aftur.

Í dag eru gomlu starvsfelagarnir hjá Kristian Martini umborð á Skarhaug 49-50 ára gamlir – og sjálvur er hann nú 65 ár.

Til stuttleikar kann nevnast, at meðan Skarhaug lá í Saltangará, vórðu nærmastu kioskirnar næstan tømdar fyri sigarettir og tubbak, tí hesar vørur eru vorðnar rættiliga dýrar í Noregi.

EIN
ØÐRVÍSI
MIÐNÁMSÚTBÚGVING

Vit bjóða eina 3-ára yrkisgymnasiala útbúgving, sum gevur atgongd til víðarigangandi og hægri lærustovnar. Tú kanst eisini fara beinleiðis í starv í vinnuni.

Tey, sum heldur ynskja at fara í læru í fiskaídnaðinum ella í alivinnuni, taka støðisárið á skúlanum.

**Ring ella send okkum teldupost og fá meira at vita!**

Fiskivinnuskúlin er m.a. kendur fyri:

- Spennandi næmingaverkætlanir
- Tvær ferðir vunnið europameistaraheitið í "European Business Game"
- Kókibókin "Góður matur úr sjónum", sum næmingar gjørdu,
- Fiskamarknaðir og spennandi uttanlandsferðir

FISKIVINNUSKÚLIN
Postrúm 96 · 350 Vestmanna · Tel. 424573 & 424496 · fax 424428
www.fiskvest.fo · fiskvest@fiskvest.fo
VASTI 457171